# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt nýtt skúlaár

Í dag byrjar onkur av miðnámskúlunum skúlagongdina aftur, og um nakrar fáa dagar byrjar eitt nýtt skúlaár í fólkaskúlanum. Tað er almenn semja um, at útbúgving og vitan eru altumráðandi í einum nútímans samfelag. Í Visjón 2015, har roynt verður at kaga inn í framtíðina, verður staðfest, at fólkaskúlin er grundvøllurin undir allari útbúgving.

Fólkaskúlin skal sjálvandi tryggja, at tey ungu gerast før fyri at útbúgva seg víðari, soleiðis at tey kunnu liva og virka í einum altjóðagjørdum heimi. Hetta er eins áhugvert og tað er sjálvsagt. Fyru bert fáum árum síðan var mantrain ein ser føroyskur skúli. Fólkaskúlin skuldi brynja børnini til at liva og virka í føroyska samfelagnum, og hetta elvdi til nógvar løgnar og marghháttligar útsagnir um endamálið við fólkaskúlanum. Men nú tykjast avvarðandi myndugleikar at hava ásannað, at Føroyar eru partur av altjóðasamfelagunm, at altjóðagerðin er ein veruleiki til gott og ilt, og at alheimurin sostatt er vorðin ein felags arbeiðsmarknaður.

Tey ungu skulu brynjast til at virka í altjóðasamfelagnum, og er hetta ein fortreytin fyri, at samfelagið eins væl og tey ungu kunnu hava rúmar virkismøguleikar í framtíðini. Í hesum sambandi eiga vit ikki at gloyma, at alt meðan fólkaskúlin verður brynjaður til altjóðagerðina, eru tað nøkur grundleggjandi virði í føroyska samfelagnum, sum vit eiga at verja og fjálga um og samstundis støðugt at menna. Hesi virði eru eitt nú hetta at læra tey ungu at liva og virka í fólkaræðiligum samfelagi, at virða og vera góð við føroyskt mál og mentan og at styrkja teirra føroyska samleika. Ein fortreytin fyri at kunna vera partur av altjóða samfelagnum er, at tú hevur tín heimliga samleika heilan og sterkan.

Fólkaskúlin skal sostatt menna og styrkja føroyska samleikan hjá teimum ungu, samstundis sum tey verða væl og virðiliga kunnað um aðrar mentanir. Við at verða kunnaður um aðrar mentanir, aðrar átrúnaðir og onnur fólkasløg, lærir tú samstundis at virða onnur eins høgt, og tú virðir teg sjálvan. Sjálvsvirðing, sjálvsálit, vitan um aðrar mentanir og vanlig almen upplýsing er besti heilivágur móti xenofobi og rasismu, ið eru sum pest fyri fólkaræði, vælferð og ta nútímansgerð, ið er ein fortreytin fyri eini samfelagsmenning, ið skal javnseta Føroyar millum fremstu lond í heiminum. Ella við ørðum orðum: ongan framburð uttan demokrati, tolsemi, upplýsing og vælferð.

Alt hetta og meira afturat er tann stóra avbjóðingin til fólkaskúlan. Fólkaskúlin er av álvara komin á dagsskrá, men sum vanligt skifta vit heldur orð um bygnað enn um innihald. Tað má sjálvsagt ásannast, at fortreytin fyri at vit av álvara kunnu fara undir eina nútímansgerð av fólkaskúlanum er størrri skúlaeindir, og hetta er so aftur bundið at kommunubygnaðinum, sum má og skal broytast. Her tykist sum gongd er við at koma á, men hetta við bygnaðinum eigur ikki at forða okkum í at umrøða og umhugsa innihaldið.

**Sosialurin**

## Lívfrøðiliga burðardygt

**JÓGVAN SUNDSTEIN**



Í hesum døgum eru mong politisk og samfelagslig mál á skránni. Tað er sjálvandi heldur ikki so løgi, tí nýggja tingsetan er júst byrjað, og vit hava bæði ólavssøkutingsetu, ólavssøkupakka og ólavssøkurøðu. Eitt mál, sum eisini fær mikla umrøðu er tað árliga »eftirsýnið« av lógini um vinnuligan fiskiskap. Eg skal ikki á hesum sinni leggja meg so nógv út í hetta orðaskifti, men kundi hugsað mær at fingið eina avkláring av onkrum av teim »nýggju« hugtøkunum, sum tingmenn og aðrir ferð eftir ferð koma við, uttan at teir definera, hvat teir meina við, ella hvussu hugtøkini skulu skiljast.

So frætt sum eg havi kunnað fylgt við, hava fleiri røðarar og skribentar lagt stóran dent á hugtakið »lívfrøðiliga burðardygt« og sett tað upp í móti ovurveiðu. Eg skilji tað soleiðis, at føroyingar, sum er, ikki reka lívfrøðiliga (biologiska) burðardygga veiðu, men tvørtur ímóti fremja ovurveiðu og harvið við vilja oyða fiskastovnarnar.

Sjálvandi skulu fiskastovnarnir verjast, og tað meini eg eisini, at føroysku myndugleikarnir halda eitt vakið eyga við, men tá nakrir politikkarar meina nakað annað, fari eg at seta hendan spurning:

Hvat er definitiónin upp á »lívfrøðiliga burðardygga veiðu«?

Hvør er førur fyri at koma við slíkari óímótsigiligari definitión?

Í fyrsta umfari verður hesin spurningur settur til hesi:

Høgna Hoydal, formann Tjóðveldisins
Edmund Joensen, løgtingslim
Eyðgunn Samuelsen, løgtingslim
Katrin Dahl Jacobsen, løgtingslim

Vónandi fái eg greitt svar.

## Klárar og greiðar linjur, takk

**FRÍÐLEIF LYDERSEN**
guðfrøðingur

Eg havi altíð lært, at virði á einum menniskjalívið ikki kann gerast upp í peningi, tí ta› er onki, sum kann geva okkum tað mista lívið aftur. Eg vænti, at øll uttan undantak eru samd við mær í hesum, tí óansæð, hvar vit standa átrúnarliga, so er lívið tað dýrabarasta vit hava. Tí er tað so sera syrgiligt at hoyra, at enn eitt ungt lív er mist, tað má handlast nú. Vit kunnu ikki fáa tey aftur, sum deyð eru, men tað er møguligt, at bjarga lívum.

Eg meini, at tað er tí upp á hægstu tíð, at okkurt verður gjørt við CTD. Eg haldi ikki, tað er føroyskum myndugleikum verdugt at brúka so langa tíð at togast um eitt so álvarsligt mál sum málið um CTD. Politiski myndugleikin eigur at seta tiltøk í verk beinanvegin, so at heilsumynduleikarnir hava klárar og greiðar linjur at halda seg til.

Tann tilvildin, sum rátt hevur, tá ið tað snýr seg um CTD, hon kann ikki halda fram. Eg haldi ikki tað er meira enn rímiligt, at tey, ið ynskja at kanna seg mugu kunna gera tað. Tey, sum lata seg kanna fyri CTD eiga at fáa hetta gjørt ókeypis. Vit vita, at hetta kemur at kosta fyri landskassan, men vit hava ikki ráð til at lata vera.

Í ferðslutrygdini hevur ein eina nullhugsjón, tað sama eigur heilsuverkið at hava sum mál. Eg haldi ikki tað er meira enn rímiligt, at vit kunnu krevja av teimum fólkavaldu at koma við greiðum reglum og koma við peninginum, sum krevst. Tí lívið fast ikki aftur, er tað fyrst mist. Tí vil eg heita á Aksel Johannessen um at fáa ruddað upp í málinum viðvíkjandi CTD beinanvegin. Nú kann ikki bara prátast, tað má handlast her og nú.

## Ólavsøkupakkin – eitt vónbrót fyri avlamispensjónistar!

**KRISTINA T. LARSEN**
løgtingskvinna



Kaj Leo Johannesen, løgmaður sigur í røðu síni á ólavsøku, »at samfelagið skal tryggja øllum javnbjóðis møguleikar«.

Hetta ljóðar gott, men er tíverri í ansøgn við ætlanina hjá samgonguflokkunum at skerja í inntøkugrundarlagnum hjá einum parti av borgarum, ið enn ikki hava fingið javnsett kor í samfelagnum.

Eg skal geva eitt dømi uppá ein fyritíðarpensjónist, ið verður raktur av hesum uppskoti.

Taka vit ein borgara, ið hevur eina miðal fyritíðarpensjón, so hevur viðkomandi fingið hesa, orsakað av at vinnuevnini eru 2/3 niðursett. Orðsaka av hesum, fær borgarin áleið 9 - 10 ts kr. áðrenn skatt, hvat ikki er nógv at liva fyri.

Í 2007 kundu vit loksins fegnast um, at inntøkugrundarlagi hjá borgarum, ið hava fingið tilluta t.d. eina miðal pensjón kom upp á eitt liviligt støði,- nevnliga møguleika at tjena 87.000 ts. kr. uttan at tað verður mótroknað í pensjónini. Tað arbeiðið, ið her er slóðað, eitt nú av undanfarna landstýrismanni í almannamálum, Hans Paula Strøm, skal nú, við einum pennastroki, brótast niður aftur.

Tíverri hevur landstýriskvinnan á hesum øki, ikki megna at gjørt sína ávirkan galdandi, áðrenn uppskotið var framlagt,- men vit eru mong, ið heita á hana um at gera sítt til, at hetta ikki kemur ígjøgnum,- tí kemur hetta uppskot í gjøgnum, so er grundarlagið undir júst viðtikna ST-sáttmálanum, um at tryggja javnsett kor til borgara, ið bera brek,- burtur.

***Við Sjálvstýriskvøðu***

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.